# Lægri útgjald í 2008 hóast økt arbeiðsloysi

Hóast talið av persónum, ið fáa útgjald frá Arbeiðsloysisskipanini, er vaksið í 2008, er miðalarbeiðsloysið lægri í 2008 enn í 2007, og hetta sæst aftur í útgjaldinum frá ALS. Í 2008 rindaði ALS tilsamans 31,8 milliónir krónur í vanligum arbeiðsloysisstuðli. Hetta talið var 34,7 milliónir krónur í 2007, og tað er ein minking upp á 8,4 prosent. Útgjaldið til arbeiðsfólk á fiskavirkjum er lítið broytt í 2008 sambanborið við 2007, útgjaldið var 13,8 mió. í 2008 í mun til 13,4 mió. í 2007.Í 2008 rindaði ALS tilsamans 45,6 milliónir krónur í útgjøldum til vanligan arbeiðsloysisstuðul, fiskavirkisskipanina, førleikamenning og í arbeiðsmarknaðargjøldum, sum eru partur av vanliga arbeiðsloysisstuðlinum og stuðlinum umvegis fiskavirkisskipanina. Samlaðu útgjøldini vóru 48,1 mió. kr. í 2007, og her er talan um 5,3% í minking frá 2007 til 2008. Við árslok 2008 fingu 513 persónar vanligt útgjald frá Arbeiðsloysisskipanini, og við byrjan av árinum vóru tað 301 persónar. Tað merkir, at talið á persónum, sum fingu vanligt útgjald frá Arbeiðsloysisskipanini við árslok 2008 var 1,8% av arbeiðsfjøldini, við árslok 2007 var arbeiðsloysið 1,3%.




# Buzz Aldrin verður filmaður

**Úti á Reyni eru upptøkurnar til Buzz Aldrin, hvor ble det av dig i alt mylderet, byrjaðar. Annfinnur Heinesen hevur fingið tann størsta føroyska leiklutin, og skal hann millum annað leika saman við danska Bjarne Henriksen**

FILMUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Endiliga eru upptøkurnar til filmin um Buzz Aldrin byrjaðar. Í morgun varð filmað úti á Reyni, har ein loppumarknaður var, og fólk komu gangandi framvið. Eitt stórt framleiðslulið er á staðnum, mannað við fólki úr øllum norðurlondum.

Statistar vóru bidnir um at møta úti á Reyni í morgun klokkan 10, men tá klokkan gekk til 11 var lítið hent. Fyrsta royndin var gjørd eina løtu eftir. Statistarnir skuldu koma gangandi úr ymsum hornum á økinum. Har komu familjur at hyggja eftir lutum, og tvær yngri gentur leitaðu eftir klæðum á einum stativi. Aðrir statistar, nakrar kvinnur, vóru bidnar um at vera standby.

Sjónleikarin, Annfinnur Heinesen, var eisini møttur í morgun. Hann hevur fingið leiklutin sum Palli, ein skitsofrenur kollfirðingur, ið verður vinur við høvuðspersónin í filminum. Teir gerast vinmenn, tá høvuðspersónurin flytir til Gjáar. Umframt Annfinn Heinesen, er kvinnuligi sjónleikarin, Annika Johannesen, sum er dóttir Eyðun Johannesen, millum føroysku leikararnar, ið hava fingið stóru leiklutirnar. Í filminum, sleppa føroysku leikararnir at tosa gøtudanskt.

Eitt kent andlit úr donskum filmi var at finna millum fólkini í morgun. Talan er um Bjarne Henriksen, ið hevur spælt við í nógvum donskum filmum. Vit minnast hann kanska best sum pápan at myrdu gentuni í røðini, Forbrydelsen. Úr Noregi kemur høvuðspersónurin, Pal Sverre Hagen.

Eftir ætlan verður filmað í fýra vikur í Føroyum, síðan tríggjar vikur í Noregi. Verkætlanin er mett at kosta 37 milliónir krónur, og verður hann væntandi klárur á heysti 2010.



*Annfinnur Heinesen hevur fingið størsta leiklutin av føroysku leikarunum. Hann skal leika Palli, hin skitsofreni kollfirðingurin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Upptøkurnar til Buzz Aldrin hvor ble det av dig i alt mylderet eru byrjaðar. Í morgun varð filmað úti á Reyni í Havn*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Danski Bjarne Henriksen telist millum høvuðsleikararnar. Hann spældi til dømis pápin at myrdu gentuni í røðini, Forbrydelsen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Gravgangur eftir sólkremi

**Uttan fyri Norðoya apotek í Klaksvík var long kø í gjár, tá sólbrendir føroyingar vildu hava fatur í sólkremi og mýggjabitakremi**

SÓLVERJA
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Stórur partur av føroyingum gongur við brendari nøs og sólbrendum ørmum hesar dagarnar, sólin hevur sæð um alt landið. Ikki øll hava hugsað um at skaffa sær sólkrem áðrenn tey fóru út í sólina, og tað hevur merkt munandi meir arbeiði á føroysku apotekunum. Serliga apotekini í Klaksvík og Runavík kunnu siga frá longum køum av fólki.

- Vit hava havt so nógv at gjørt, at vit nærum ikki hava kunnað nøkta tørvin. Bæði í Klaksvík og Runavík hava vit havt sera stóran eftirspurning. Tað er tað vanliga, ið er útselt, faktor 20 og mýggjabitakrem 2, ið styggir mýggjabitarnar burtur, greiðir farmakonomurin á apotekunum frá, Nanna Knudsen.

Hon heldur, at fólk eru væl vitandi um at tey skulu verja seg móti sólini.

- Tað eru nøkur, ið verða brend, men fólk vita væl av, at tey skulu verja seg móti sólini. Tað er rættiligavanligt við stóra eftirspurninginum eftir teir fyrstu sóldagarnar á árinum, sigur hon.

Apotekini royna at hava so passaliga goymslu, og hava bílagt manglandi dunkarnar inn aftur. Teir vera aftur at finna á hillunum í komandi viku. Til tá hava Eysturoyar og Norðoya Apotek eina goymslu av sólkremi við høgum faktori. Tað er betur enn einki.



*Føroyingar vita, at teir skulu verja seg móti sólini. Kortini er tað vanligt, at teir eru seinir á veg at skaffa sær neyðugu verjuna*
*Savnsmynd*